## Vilja hjálpa við bótini

Ein bólkur á Fecebook er nú farin undir innsavnan til danska "Fjolset i Parken", sum fyri tveimum árum síðani leyp inn á vøllin, tá Danmark og Svøríki spældu. Maðurin varð í vár dømdur at rinda 900.000 krónur í endurgjaldi til DBU, og sjálvur sigur hann, at hann ikki er førur fyri at gjalda. Á Facebook verður sagt, at tað er órímiligt av DBU, at tey frásiga sær ábyrgdina og einvíst knúsa lívið hjá einum manni, sum ongan kjans hevur at bera byrðuna.



## FIFA tveitir Irak út

FIFA vil ikki finna seg í, at olympiska nevndin í Irak nú hevur tikið ræðið á fótbóltssambandinum. Ein av aðalreglunum hjá FIFA er, at fótbólturin ger av, hvat hendir í fótbóltsviðurskiftum, og nú Irak ikki aktar hesa reglu, hevur FIFA givið irakiskum fótbólti eitt fyribils bann. – Irak og irakisk feløg kunnu ikki spæla altjóða dystir, og irakiska fótbóltssambandið hevur ikki longur møti- ella atkvøðurætt til kongressirnar hjá FIFA, stendur at lesa á heimasíðuni hjá altjóða fótbóltssamgonguni.

# Íslendskur venjari til HB

**Á tíðindafundi í dag setti HB navn á mannin, sum skal venja besta mansliðið hjá felagnum í 2010. Maðurin er íslendingur og eitur Kristján Guðmundsson**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Síðani tað stóð greitt, at gullvenjarin hjá HB, Sámal Erik Hentze, ikki helt fram í starvinum, hevur verið gitt dúgliga um, hvør nýggi venjarin hjá høvuðsstaðarfelagnum verður.

Nógv nøvn hava verið í umferð, men á tíðindafundi í morgun varð endaliga staðfest, at talan verður um íslendskan venjara.

Kristján Guðmundsson, sum maðurin eitur, er 44 ára gamal, og í fimm ár hevur hann verið venjari hjá Keflavík í bestu íslendsku deildini. Besta úrslitið rakk hann í 2008, tá Keflavík á seinasta leikdegi snávaði í gullstríðnum, men har venjarin varð kosin sum tann besti í Íslandi tað árið.

Í Føroyum verður setningurin sjálvandi at halda HB har, sum felagið heldur seg hoyra heima. Nevnliga í toppinum av føroyskum fótbólti.




**Fyrrapartin í dag kundi HB loksins seta navn á nýggja venjaran**
Mynd: Álvur Haraldsen

## H71-KÍF 27-27 (16-13):

# KÍF sleppur ikki av aftasta plássinum

**Nú líkindi fyri, at eitt lið noyðist úr bestu mansdeildini til komandi kappingarár, eru góð, stríðast kollfirðingar fyri lívinum. Men hóast ósigraðir í tríggjar dystir eru teir framvegis botnlið**



uni@sosialurin.fo
Uni Holm Johannesen

Team Klaksvík eru fremstir í næstbestu deildini. Trý stig eru niður til nærmasta kappingarneytan. Og tað hevur av álvara áhuga millum feløgini í bestu deildini.

Tað eru góð líkindi fyri, at vit til komandi kappingarár fáa eina broyting í bestu deildina. Eydnaðst tað Team Klaksvík at vinna sær uppflyting, noyðist aftasta fyri í Atlantic Airways at spæla í 1. deild.

Tí eru alarmklokkurnar farnar at ringja í Kollafirði, har KÍF stríðst fyri lívinum í bestu deildini. Liðið er framvegis botnproppur, hóast kollfirðingar eru ósigraðir síðan 8. november.

### H71 við yvirlutan

KÍF vitjaði í gjár í Hoyvík. H71 hevði tørv á tveimum stigum í kapprenningi við oddan, og heimaliðið var eisini við yvirlutan í stórum løtum av dystinum. Hoyvíkingar togaðu seg miðskeiðis í fyrra hálvleiki trý mál framum, og leiðslan helt við til fimm minuttir restaðu í.

Men einum framúrskarandi stríðsvilja at takka, ressaðust kollfirðingar við aftur. Í seinastu minuttinum vóru kollfirðingar eisini á odda við 27-26, men við einum seinasta aftursvari eydnaðist tað H71 at vinna sær eitt stig, hóast alt.

Dánjal Tórgarð var toppskjútti hjá H71 við sjey málum. Andrias Nielsen og Gert Hansen skutu fimm mál hvør fyri KÍF.